# Toy á nýggjan hátt



**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos
**MYNDIR OG HUGSKOT:** »Sy – elsk tekstiler« frá IKEA

IKEA hevur givið nýggja bók út »Sy – elsk tekstilier«. Bókin mælir til, at vit nýta meiri toy, bæði har vit plaga at hava tað, og har vit ongantíð hava hugsað um at nýtt toy áður.




Bókin er á tremur við góðum hugskotum, og Vikuskifti hevur lánt nøkur av teimum bestu.

Tað, ið er øðrvísi við hesi bók, er, at hon mælir til at vit broyta háttin, vit eru von við at fáast við toy uppá. Tveit seymitráðin burtur og nýt hønu ella sterkt klisturband at hefta við. Saksurin kann eisini fara sama veg - skræð toypettini ístaðin.

Við hesum leggur »Sy - elsk tekstilier« upp til, at tey, ið eru bangin fyri at seyma, skulu tora at fara í holt við toy, og at ting, vit áður ikki hava ímyndað okkum sum toyklødd, verða tað.

## MADRASSUSONG

Tær nýtist:
Madrassir – ein madrass ger ongan glaðan – men sjey gera nógv glað!
Toy
Sentimeturmál
Saks
Klisturband

1. Finn út av, hvussu stór madrassin er
2. Klipp eitt toystykki, ið er dupult so stórt sum madrassin
3. »Pakka« madrassina inn, sum tú pakkar ein pakka
4. Heft við sterkum klisturbandi
5. Legg madrassurnar oman á hvørja aðra, og eina kann tú seta aftanfyri hinar til høvdalag.



## TOYBORÐ

Tær nýtist:
Sentimeturmál
Toy
Hønu

Træ, træ, træ. Hví kann eitt borð ikki verða gjørt av toy ístaðin? Jú sjálvandi kann tað tað!

1. Finn út av, hvussu stórt borið er
2. Klipp eitt toystykki og heft tað í borðskivuna við hønuni.
3. Klipp toyið í 5 cm breiðar strimlar og rulla rundan um borðbeinini.
4. Heft við hønuni

## STRIMLALAMPA

Tær nýtist:
Ein gamlan lampiskerm (ella nýggjan)
Restir av toyi

1. Vel nakrar toyrestir, ið gera teg glaðan
2. Skræð toyið í umleið 2 cm strimlar
3. Bind strimlarnar fastar í lampiskermin
4. Eitt, tvey – og tú er liðug

